

**Eg vil spæla** til eg verði 40

Les interview við ítróttarprofilin **Helen á Lakjuni**

**Lívið er ov stutt** til at klandrast um jørð

Vit hitta løgfrøðingin **Sigmund Poulsen**, sum upplivir eitt sindur av hvørjum í sínum starvi



**Byggir oljupallar** fyri milliardir

Prát við **Jóannes Kjølbro**, sum starvast innan oljuvinnuna í fjareystri



VIKUSKIFTI – í Sosialinum í morgin


# Sudoku-vinningurin fór til Klaksvíkar

**Ingrid Heinesen í Klaksvík vann ferðaseðlarnar frá Atlantsflog í Sudoku-kappingini í mars**


SUDOKU
*Gudny Langgaard*
*gudny@sosialurin.fo*


Vinnarin av Sudoku-kappingini í mars mánað er 38 ára gamla Ingrid Heinesen.

Ingrid Heinesen er búsitandi í Klaksvík og starvast á Norðoya Røktarheimi.

Henni dámar væl at loysa Sudoku-uppgávur og spælir altíð við í kappingini hjá Sosialinum. Tað hevur hon gjørt síðani blaðið byrjaði upp á kappingarnar, sum var í desember 2005.

Ingrid hevur vunnið tveir ferðaseðlar frá Atlantic Airways, sum hon er sera glað fyri. Hon eigur eina dóttir, sum býr í Danmark og ætlar at brúka ferðaseðlarnar til at vitja hana. Annars er Ingrid Heinesen ógvuliga glað fyri vinningarnar í Sudoku-kappingunum og heldur, at tað økir um spenningin við so góðum vinningum.

Vinningurin í apríl mánaði er eitt 15-túra gávukort frá Bailine, sum óivað nógv konufólk kundu hugsað sær.



*Ingrid Heinesen í Klaksvík hevur eina dóttir í Danmark, og tí komu ferðaseðlarnir ógvuliga væl við*



*Birgar Johannesen, sum er dagligur gestur á Sosialinum – fekk heiðurin at trekkja sudoku-vinnaran fyri marsmánað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


har ferðin byrjar



FlatRate 1
Riggar stak væl til alla vanliga alnetsnýtslu. Umfram at flyta postin skjótt og trygt, ferðast tú skjótari enn áður til ytstu klivar á alnetinum.
256/128
269,-

FlatRate 2
Tú fært uppaftur skjótari ferð og flytir teg uppaftur skjótari á internetinum.
512/256
369,-

FlatRate 3
Tað er nógv skjótari at taka film og tónleik niður. Tú hugnar tær við øllum handa spølum á netinum
1024/512
609,-

Øll hald hjá FlatRate.fo hava breiðbandstelefoni við
FlatRate.fo